# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# ØLL HØVUÐSVINNAN Í VANDA

Tað varð ávarað fyrr í summar, tá landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum gjørdi av, at Føroyar fara at áseta sær sína egnu makrelkvotu. Ávaringarnar vóru júst tær, at hetta kann fáa avleiðingar fyri alla fiskivinnuavtaluna við ES.

Men landsstýrismaðurin stóð bara við sítt, at hetta er okkara rættur, og tí gera vit sum vit vilja. Gamaní eru vit samd við landsstýrismannin í, at okkara partur av samlaðu makrelkvotuni er alt ov lítil, og vit halda eisini, at tað er ósømuligt av Noreg og ES at føra seg soleiðis fram móti eini lítlari fiskivinnutjóð, sum heilt eyðsæð eigur sín nátúrliga part av hesum fiskiríkidømi, sum eisini gongur sjón fyri søgn í føroyskum øki nú.

Men tað hjálpir so lítið at halda og meina, tá tað um stórpolitikk ræður. Tú verður noyddur at fylgja samráðingarleiðini, sum ofta kann verða strævin, men tað er har, politiska handverkið og tevið skal brúkast. Tað er júst í slíkum støðum, at vit hava brúk fyri góðum politikarum - politikarum, sum duga at føra síni sjónarmið fram, politikarum, sum duga at samráðingarleiðina og at skapa respekt um seg sjálvan hjá mótpartinum.

Tað sum nú er hent er, at fiskivinnukommiserurin hjá ES, Maria Daminaki, hevur sagt, at føroyska støðan í markrelmálinum kann fáa avleiðingar fyri alla fiskiveiðiavtaluna við ES. Hon sigur, at hon ivast í, um nøkur fiskiveiðiavtala verður gjørd við Føroyar og Ísland komandi ár, um ikki ein loysn fæst á makrelmálinum.

Og hetta er mín sann álvarsligt. Hetta er ein beinleiðis hóttan móti lívsgrundarlagnum hjá Føroyum, og hóast vit halda tað verða langt úti og ikki sørt imperialistiskt av einum politikara í hennara støðu at føra fram, so var hetta ikki annað enn væntandi. Tað var júst hetta, sum ávaringarnar snúðu seg um fyrr í ár, tí at landsstýrismaðurin ikki førdi samráðingarleiðina at enda. Hvat skulu vit gera gera móti einum risa sum ES, sum hóttir okkum soleiðis? Jú, landsstýrismaðurin sigur, at vit skulu ikki blanda makrelveiðina saman við øðrum fiskasløgum. Gamaní, men hvat hjálpir tað?



Tað er svárt at síggja markrelríkidømi fyri føtur okkara og ikki sleppa at veiða. Men sum partur av heimssamfelagnum - so eru nakrar spælireglur, sum skulu haldast. Landsstýrið átti tí at sett alt skjútsið móti ES. Vit hava eina sendistovu har, og vit eru partur av einum ríki, sum er limur í ES. Øll vápn áttu at verið brúkt til tess at sannføra skrivstovuveldið í Brússel um okkara støðu, soleiðis at lívsgrundarlagið undir samfelag okkara ikki verður hótt, tí vit ikki duga nóg væl at føra okkara sjónarmið fram.

**Alt sjútsið eigur at verða vent móti Brússel**

# Lærarar og pedagogar ongar pengar



20 stólar standa tómir á Føroya Læraraskúla í komandi viku, tá skúlarnir byrja aftur. Ikki tí at skúlanum vantar játtan, men tí at Mentamálaráðið hevur sett ov lítið av peningi av til útbúgvingarstuðul, og tí eru ráðini ikki til at taka inn 80 næmingar á skúlan sum ætlað, men bara 60.

Ein sera margháttligur politikkur. Vit eggja ungum at fara undir útbúgving, júst nú, tá arbeiðsloysi er stórt, serliga ungdómsarbeiðsloysi - og samstundis sum samfelagið skríggar eftir útbúnum pedagogum, og tørvurin á útbúnum lærarum eisini er eyðsýndur.

Ein lítið virðilig støða fyri politisku skipanina, har vinstra ofta ikki tykist vita, hvat høgra ger...

# Framsýning í Haraldssundi

Haraldsunds skúli fyllir 80 ár í 2010. Í hesum sambandi verður skipað fyri eini framsýning fríggjakvøldið 13. august og leygardagin 14. august.

Fyrireikararnir hava samlað eini hundrað myndir, sum lýsa alla skúlatíðina í Haraldssundi. Elsta myndin er av ferðalærara, ið røkti lærarastarvið á Kunoynni í 1892.

Umframt áhugaverdu myndirnar eru gamlir skúlalutir tiknir fram aftur og settir inn í skúlastovuna. Tey vitjandi kunnu eisini lesa ymisk gomul skjøl, ið liggja frammi. Hetta eru skjøl, ið eru viðkomandi fyri Haraldssunds skúla.

Tiltakið byrjar fríggjadagin 13. august klokkan 19.00. Hetta kvøldið verður framsýningin sýnd frá klokkan 19.00 til klokkan 22.00.

Tiltakið byrjar við eini hugnaløtu, har borgarstjórin í Kunoyar kommunu bjóðar vælkomin, og haraldssundskvinnan og søgufrøðingurin Óluva Klettskarð heldur ein fyrilestur. Eisini verður felagssangur. Hugnaløtan verður í bygdarhúsinum.

Eftir hugnaløtuna kunnu fólk leita sær niðan í skúlan, har framsýningin er sett upp. Klokkan 21.00 hetta kvøldið er møguleiki at síggja film í bygdarhúsinum. Talan er um film, ið er upptikin í Haraldsundi fyrst í sjeytiárunum.

Leygardagin er framsýningin opin millum klokkan 14.00 og 17.00

Framsýningin er ókeypis og tey vitjandi fáa køkur og kaffi.

Fyrireikararnir vóna, at nógv fólk leggja leiðina norður til Haraldsunds at hyggja at hesi sjáldsomu framsýning.



## Bara føgur orð?

BERGTÓRA H. JOENSEN
KJAK Á SÍÐU 13



## Blinda landsstýrisliðið

JENIS AV RANA
KJAK Á SÍÐU 12



# Eidesgaard onga viðmerking

Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri, vil ikki siga, hví hann í tvey ár á rað ikki hevur tikið lut í skrúðgonguni á ólavsøku. Rás2 bað hann í gjár um eina viðmerking, men hann vil einki siga.

Miðlarnir í Miðlahúsinum settu sær fyri eftir ólavsøku at fáa greiði á hesum og hava seinastu vikurnar roynt at fingið fatur á Jóannes Eidesgaard, men tað hevur ikki eydnast fyrr enn nú, hann er komin heimaftur.

Ætlanin var at spyrja hann, hví hann ikki hevur verið við í skrúðgonguni, síðani Kaj Leo Johannesen gjørdist løgmaður. Ætlanin var eisini at spyrja hann, um tað er so, at hann ikki vil ganga aftan fyri Kaj Leo Johannesen, og um hann púrasta boykottar skrúðgonguna og heldur ikki ætlar sær at verða við í skrúðgonguni næsta ár.

Danski uttanríkisráðharrin, Lene Espersen, er komin illa fyri, tí hon ikki møtir til fundir og aðrar uppgávur, sum hon eigur at røkja sum ráðharri. Kritikkurin móti henni er so ógvusligur, at hon í útlendskum bløðum verður skírd heimsins vánaligasti uttanríkisráðharri.

Eisini hesa samanbering, ætlaðu vit at spyrja Jóannes Eidesgaard um. Men umvegis sms fáa vit bara at vita, at fíggjarmálaráðharrin hevur onga viðmerking.

Sosialurin Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*